Sosialurin

Nr. 11 - 18. januar 2010

# Derhard fekk sítt

**So eru øll prestastørvini sett kring landið. Avgerðin um seinasta starvið fall í farnu viku, tá avgjørt varð at Derhard Olsen verður nýggjur sóknarprestur í Suðurstreymoy. – Hetta er eitt dreymajobb, sigur nýggi presturin**



Eg gleði meg at fara til verka, sigur Derhard Olsen, nýggjur sóknarprestur í Suðurstreymoy



**PRESTAR**
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Havn:** - Eg havi áður búð her í Suðurstreymoy. Og nú gleði eg meg til at koma aftur, sigur 35 ára gamli Derhard, sum hevur búð 10 ár í útlegd.

Derhard Olsen søkti starvið sum sóknarprestur í Suðurstreymoyar vestara prestagjaldi, og í farnu viku fekk hann at vita, at hann varð settur í hetta starvið. Her skal hann samstarva við Bergur D. Joensen og Hera Joensen.

Hóast Derhard ikki enn er innsettur í starv sítt, hevur hann sínar hugsanir um, hvat hann millum annað fer at leggja dent á í tænastu síni – til gagns og gleði fyri kirkjuna og kirkjuliðið:

Eg vil fegin gera mítt til at skapa eina kirkju, sum kann fevna um øll og sum kann røkka til allar aldursbólkar í Suðurstreymoy!

Derhard Olsen er giftur við Nicolinu og eiga tey tvey ára gomlu døttrina, Rebekku. Hann hevur virkað eitt skifti sum prestur í Samuelskirkjuni í Keypmannahavn.

Hann verður innsettur við eina gudstænastu í februar mánaði. Í sóknini eru fýra kirkjur – Vesturkirkjan, eins og kirkjurnar á Argjum, Kirkjubø og í Hesti.

## Stórur áhugi

Hetta hevur verið ein stríggin tíð hjá starvsfólkunum á skrivstovuni í Bispagarðinum. Og serliga man bispur hava havt úr at gera hesar seinastu nógvu mánaðirnar.

Tað hava verið drúgvar samráðingar við myndugleikarnar um at fáa allar lógir og greinar til rættis fyri at kunna seta hesi størvini: Nú gjørdist so umsíðir gjørligt hjá føroysku fólkakirkjuni at fáa sett tey fimm prestastørvini og starvið sum dómpróstur.

Fyrstu lýsingarnar um at hesi størvini vórðu lýst leys, komu út í november, og varð freistin at søkja sett til 10. desember í fjør. Og tað vísti seg beinanvegin, at stórur áhugi var fyri at søkja.

Til fleiri av størvunum vóru bæði fimm og seks umsóknir, og ikki færri enn tríggir av verandi prestunum vildu vera dómpróstar. Og tær seinastu vikurnar hava fólk í rættiliga nógvum kirkjuráðum umrøtt allar hesar umsóknirnar.

Eftir teirra innstilling varð málið latið Jógvan Fríðriksson bispi, áðrenn hann læt tað yvir til mentamálaráðharra okkara, Helenu Dam á Neystabø at seta í starv.

Hesin møguleikin hevur ikki verið seinastu 2-3 árini, og tí komu allar hesar starvssetanirnar so at siga í senn.

Men nú er ein loysn funnin á málinum, soleiðis at føroyska kirkjan á fyrsta sinni í nýggjari tíð, hevur sett so nógvar prestar í starv eftir góðum mánaði.

## Setan í starv

Gongdin henda seinasta mánaðin hevur verið hon, at teir settu prestarnir sohvørt eru vorðnir innsettir til tænastu sína kring landið. Higartil eru tveir prestar innsettir.

Næstseinasta sunnudag varð Hanus á Gørðum innsettur sum sóknarprestur í Norðoya vestara prestagjaldi, og í gjár varð Símun P. Jacobsen innsettur sum prestur í Sjóvar prestagjaldi við eina hátíðargudstænastu sum eisini varð víst í Kringvarpinum seinnapartin ígjár. Komandi sunnudag verður so Theodor E.D. Olsen settur – aftur, kunnu vit siga – í prestastarvið í Kvívík.

Síðani verður stórur dagur í Dómkirkjuni, tá bæði prestur og dómpróstur verða innsett sunnudagin 31. januar. Her er talan um Una Næs, sum er nýggjur dómpróstur og Ann Dahl Hansen sum er sóknarprestur í Suðurstreymoyar eystara prestagjaldi.

Tá henda gudstænastan er avgreidd, er bert tann eini presturin eftir at seta í hesum umfarinum – nevniliga Derhard Olsen í Suðurstreymoyar vestara prestagjaldi.

Fleiri av prestunum, ið nú annaðhvørt eru ella verða settir, koma úr øðrum størvum, og tí er neyðugt at lýsa hesi leys av nýggjum. Her er talan um starvið sum sóknarpestur í Fuglafirði, eftir Una Næs og í Hvalba eftir Símun Jacobsen og Ólavur Rasmussen.

> *Eg vil fegin gera mítt til at skapa eina kirkju, sum kann røkka til allar aldursbólkar í Suðurstreymoy*
> *(Derhard Olsen)*



*Ann Dahl Hansen hevur fýra kirkjur í sínum prestagjaldi – Dómkirkjan, Hoyvík, Nólsoy og Kaldbak*